Hjalti í Jákupsstovu:

# Áseta vit ikki svartkjaftakvotuna ger OPEC tað fyri okkum

**Svartkjafturin er ein lutfalsliga bíligur fiskur, og tá ið minni verður at veiða, fer tað ikki at loysa seg at senda tey stóru og dýru skipini út á havleiðirnar eftir hesum fiskaslagi. Tí heldur leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni, at antin verða tað vit sjálvi, sum noyðast at loysa hetta málið - ella verður tað OPEC, ið ásetir oljuprísirnar, sum loysir málið fyri okkum**



*- Smjast londini ikki um eina ábyrgarfulla heildarkvotu, kunnu vit bert vóna, at stovnurin ikki verður alt ov illa fyri, tá ið royndin fer at minka av sær sjálvum, sigur Hjalti í Jákupsstovu· Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIVINNA
*vilmund jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í døgunum, 27-29. september, vóru samráðingar á Hotel Hafnia í Havn um svartkjaftin. Strandalondini, sum royndu at finna semju um veiðina av hesum tilfeingi, vóru Føroyar, Ísland, Noreg og ES, og Russland var við sum eygleiðari.

Landsstýrið hevði tveir ráðgevar við á hesum fundi. Annar var Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni; hin var Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur.

### Úrslitaleysur fundur

Hjalti í Jákupsstovu sigur, at fundurin endaði úrslitaleysur.

– Nei, enn er so langt ímillum partarnar, at her kom einki ítøkiligt burtur úr.

Hann sigur, at generelt fyri strandalondini er, at tey krevja ein ov stóran part av svartkjaftinum, og hetta snýr seg serliga um ES, Noreg og Ísland.

– Vit krevja sjálvsagt okkara eisini part, og vit halda, at hinir krevja ov nógv.

Hjalti sigur, at ES, sum hevur verið rættiliga tungt at dansað við í spurningingum um svartkjaftin, hevur minkað síni krøv nakað, men framvegis eru samlaðu krøvini á kvotum eini 130-140% størri, enn mett verður ráðiligt at fiska av stovninum.

– Eg vil siga, at londini eru samd um, hvussu fiskiskapurin eftir svartkjafti skal skipast, men tey eru ikkki samd um heildarkvotuna.

Hann sigur, at útrokningar hjá ICES vísa, at ein gongd leið kundi verið at fiskað 1,5 miljónir tons í eini 2-3 ár og síðan lækkað heildarkvotuna niður í 1 miljónir tons.

– Veiðan eftir svartkjafti í økjunum hjá strandalondunum og í altjóða sjógvi er alt ov stór.

Hjalti vísir á, at samlaða veiðan í fjør var 2,3 miljónir tons, og at veiðan higartil í ár er 2 miljónir tons.

– Hetta er tað, sum veitt verður í íslendskum sjógvi, føroyskum sjógvi, norskum sjógvi, ES-sjógvi og í altjóða sjógvi.

Hann vísir á, at veiðan eftir svartkjafti soleiðis er nógv størri, enn stovnurin í longdini tolir.

– Á fundinum varð roynt at finna eina semju, soleiðis at heildarveiðan komandi ár verður 1,5 miljónir tons, men hetta eydnaðist ikki. Fleiri uppskot vóru frammi í hesum sambandi, men einki vann frama, sigur Hjalti.

Á fundinum á Hotel Hafnia samdust londini tó um at hittast aftur, tá ið NEAFC fer at hava fund, 10. november.

– Tað er torført at siga, um nakað úrslit fer at spyrjast burtur úr tá, nú so langt framvegis er millum partarnar, sigur hann.

### Tvey prinsippir

Sum skilst, er tann stóri trupulleikin, hvussu ein minni heildarkvota skal býtast millum londini.

– Í hesum spurningi standa tvey prinsippir ímóti hvørjum øðrum. Annað er, at kvotan skal býtast eftir, hvussu nógvur svartkjaftur er hjá hvørjum einstakum landi – og hvussu fiskurin ferðast millum havleiðirnar. Hitt er eitt býti, sum byggir á, hvussu nógv einstøku londini veiða av svartkjafti.

Hjalti sigur, at hesi bæði sjónarmiðini standa upp ímóti hvørjum øðrum, og stevið er ringt, tí hvør vil hava sum mest burtur úr. ES hevur gjørt krav uppá 40% av kvotuni, men einki er at ivast í, at hetta kravið má minkast, um nøkur loysn skal finnast.

– Vit halda, at hesi bæði sjónarmiðini um býtið eru skilagóð og kunnu fyrihalda okkum til tey bæði, sigur hann.

Hjalti vísir á, at norðmenn veiða størstu nøgdirnar av svartkjafti; teir fiska bæði í norskum sjógvi, føroyskum sjógvi, ES-sjógvi og í altjóða sjógvi. Í aðru røð yvir mestu veiði koma íslendingar.

– Men samstundis verða størstu nøgdirnar veiddar í føroyskum sjógvi, leggur hann aftrat.

### Onnur viðurskifti

Undir samráðingunum heittu føroysku umboðini á partarnar um eisini at hyggja at øðrum viðurskiftum, nú svartkjafturin aftur var til viðgerðar.

– Vit heittu á londini um eisini at hyggja at, hvønn týdning svartkjafturin hevur fyri ymisku londini. Soleiðis vístu vit á, at hetta tilfeingið hevur ómetaliga stóran týdning fyri okkum føroyingar – bæði fyri tann flotan, sum fiskar svartkjaft, men so sanniliga eisini sum býtisfiskur fyri eitt nú tosk í Barentshavinum og fyri veiðirættindi í ES-sjógvi.

Spurdur, um londini ikki duga at síggja stóra týdningin, sum svartkjafturin hevur fyri Føroyar, sigur Hjalti:

– Jú, teir hava sympati fyri okkum privat, men kortini roynir hvør at skava sum mest til sín sjálvs, og soleiðis vil tað nú einaferð vera í samráðingum um veiðirættindi.

### ICES ella OPEC?

Øll tekin eru um, at tað verður torført hjá standalondunum at semjast um eina ábyrgdarfulla heildarkvotu av svartkjafti.

Hjalti torir ikki at meta um, hvørt ein kvota uppá 1,5 miljónir tons, sum ICES mælir til, kemur í lag til komandi ár. Men hann er onga løtu í iva um, at veiðan eftir svartkjafti fer at minka, sum árini ganga, um eingin semja fæst í lag.

– Tað verða antin vit sjálvi, sum sita á svartkjaftinum – ella OPEC, sum fara at avgera hetta. Svartkjafturin er lutfalsliga bíligur fiskur, og tá ið minni verður at veiða, fer tað ikki at loysa seg at senda tey stóru og dýru skipini út á havleiðirnar eftir hesum fiskaslagi.

Tí heldur leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni, at antin verða tað vit sjálvi, sum noyðast at loysa hetta málið - ella verður tað OPEC, ið ásetir oljuprísirnar, sum loysir málið fyri okkum, soleiðis at vit ikki forkoma svartkjaftastovninum.

– Semjast londini ikki um eina ábyrgarfulla heildarkvotu, kunnu vit bert vóna, at stovnurin ikki verður alt ov illa fyri, tá ið royndin fer at minka av sær sjálvum, sigur Hjalti í Jákupsstovu.



*– Undir samráðingunum vístu vit á, at svartkjafturin hevur ómetaliga stóran týdning fyri okkum føroyingar – bæði fyri tann flotan, sum fiskar svartkjaft, men so sanniliga eisini sum býtisfiskur fyri eitt nú tosk í Barentshavinum og fyri veiðirættindi í ES-sjógvi, sigur Hjalti í Jákupsstovu*



# Make-up artistskúli til Føroya

**Gongst sum ætlað, verður ein make-up artistskúli í Føroyum í januar. Talan er um skeið, sum varar seks vikur. Íslendskar kreftir standa aftan fyri hesa ætlanina, og í farnu viku var ein lærari frá einum slíkum skúla í Íslandi í Føroyum og helt skeið**



*Gongst sum ætlað, verður ein make-up artistskúli í Føroyum í januar. Íslendskar kreftir standa aftan fyri ætlanina*
*Mynd: Jens K. Vang*

MAKE-UP
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Nógv bendir á, at íslendskir make-up artistar hava ætlanir um at koma inn á føroyska marknaðin. Í øllum førum er tað ein skúli, sum arbeiðir við einum merki, sum eitur No Name, sum hevur ítøkiligar ætlanir um at gera seg galdandi á føroyska marknaðinum.

Men tað er ikki tað einasta. Ætlanir eru eisini frammi um at byrja ein make-up artistskúla í Føroyum. Ikki ber til at frætta so nógv um ætlaninar, men í øllum førum ljóðar tað, at skúlin skal byrja í Føroyum í januar komandi ár.

Vanliga tekur eitt slíkt skeið tríggjar mánaðir í Íslandi. Men um skúlin kemur til Føroya, so er ætlanin, at hann bert skal vara í seks vikur.

Í Íslandi ganga tey í skúla frá klokkan 8 til 13 í tríggjar mánaðir, meðan tey í Føroyum koma at ganga í skúla frá klokkan 8 til 16 í seks vikur. Á hendan hátt læra tey júst tað sama sum í Íslandi, bara upp á stytri tíð.

### Útsettur skúli

Skúlin skuldi upprunaliga byrja í Føroyum í september, men bleiv av ymsum orsøkum ikki til nakað. Ístaðin skipaði íslendararnir fyri hesum skeiðinum, sum ein av lærarunum á íslendska make-up artistskúlanum hevði í síðstu viku. Skeiðsleiðarin, sum var her í Føroyum, eitur Silla.

Á skeiðnum, sum varð hildið á frisørdeildini á Tekniska skúla í Havn, lærdu luttakararnir fýra ymiskar hættir at leggja make-up.

Tað fyrsta kvøldið løgdu luttakararnir milt dag og kvøld make-up. Næsta dagin brúðar make-up, triðja dagin nakað sum eitur Smokey eyes og fjórða dagin make-up til Catwalk. Smokey eyes er make-up, har serliga eyguni verða gjørd myrk ella heilt svørt. Modellirnar vóru ymiskar, og luttakararnir nýttu eisini høvi til at taka áðrenn og aftan á myndir.

Tá make-up skal leggjast til Catwalk, skal tað ofta verða øðrvísi og sterkt. Um til dømis fólk ganga mótaframsýning fyri hár, so kann tað sum skilst vera gott, at leggja líka make-up á allar modellirnar.

Skeiðsluttakararnir lata væl at skeiðinum, og tey munnu vera fleiri, ið eru sera spent at vita, um make-up artistskúlin kemur til Føroya í januar.



*Silla, sum hevði skeiðið á frisørdeildini á Tekniska skúla, er lærari á einum íslendsum make-up artistskúla*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2005 er mánadagin 1. nov. 2004**




**Í mars 2005 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist við óbroytt.**

**Hvítu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2005 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 660 í telefonbókini 2004,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing ................................ kr. 700,00
(B) Innramming...................................... kr. 800,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) . kr. 25,00
(sí dømi á s. 658 í Telefonbókini 2004)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 659 í telefonbókini 2004, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo

FØROYA TELE